Álit

í

løgtingsmáli nr. 110/2023: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt (Skattalógin) (Frádráttur fyri samsýning fyri hjálpararbeiði við kirkjuligum, manngóðum ella alment gagnligum endamáli)

Steffan Klein Poulsen og Jenis av Rana, løgtingsmenn, hava lagt málið fram 7. mars 2024, og eftir 1. viðgerð 21. mars 2024 er tað beint Fíggjarnevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi 2., 18. og 23. apríl 2024.

Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund við Føroya Ungdómsráð, Skansahúsið, ÍSF, Kirkjuligu Heimamissiónina, samkomuna Keldan í Skálafirði og landsstýriskvinnuna í fíggjarmálum, Ruth Vang, saman við TAKS.

Undir viðgerðini hevur nevndin býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Eyðgunn Samuelsen, Bjarni Hammer, Eirikur í Jákupsstovu, Hanna Jensen, Beinir Johannesen og Magnus Rasmussen) viðurkennir, hvussu stóran týdning virknir felagsskapir innan ítrótt, innan fjølbroytt manngott arbeiði, eins og innan samkomu- og kirkjuligt arbeiði hava. Harumframt viðurkennir meirilutin, hvussu stóran part av hesum nevnda arbeiði sjálvboðin standa fyri og fremja.

Kanningar vísa, at umleið helvtin av føroyingum regluliga gera sjálvboðið arbeiði.

Hetta sjálvbodna arbeiðið ber týdningarmiklum funktiónum í landsins felagslívi uppi, og tað verður trupult at gera upp í krónum og oyrum, hvussu stóra ávirkanin av sjálvbodna arbeiðinum ger okkara samfelag betri og hevur góða ávirkan á einstaklingin, sum ger sjálvboðið arbeiði. Stutt sagt er tað sjálvbodna arbeiðið í Føroyum ómissandi, og nógv eigur at verða gjørt fyri, at hendan mentanin at luttaka í sjálvbodnum arbeiði heldur fram.

Undir viðgerðini er komið fram, at verandi skipan við skattafríari samsýning upp til 50 tús. kr. árliga riggar sera væl innan ítróttina og er vorðin ein inngrógvin partur av, hvussu ítróttafeløg skipa sítt sjálvbodna arbeiði bæði í venjing, samskipan og øðrum týdningarmiklum leiklutum í ítróttini. Eisini riggar skipanin við serstøkum V-tali væl, so at hon er løtt at umsita hjá landi og feløgum.

Tá tað er sagt, so eru avbjóðingar og ivamál við fyriliggjandi uppskoti. Fyri tað fyrsta er eingin fíggjarlig meting gjørd, sum við hampiligum neyvleika kann siga, hvør fíggjarliga avleiðingin av uppskotinum verður fyri landið. Uppskotið inniheldur ongan fíggingarleist við uppskoti um

umleggingar, sparingar ella inntøkur, sum kunnu fíggja lógarbroytingina. Hetta er ein munandi avbjóðing við uppskotinum, metir meirilutin.

Undir viðgerðini er komið fram, at samlaða skattafría samsýningin eftir verandi áseting í § 29 b í skattalógini, har samsýning til dómarar, linjuverjar, umframt til venjarar innan ítróttina, og leiðarar og hjálparar hjá ítróttafeløgum, er skattafrí upp til 50 tús. kr. um árið, er umleið 20 mió. kr. um árið. Tað er tó trupult at meta um, hvør árligi kostnaðurin verður fyri landskassan í mistum skattainntøkum, um hetta uppskotið verður samtykt, sum tað fyriliggur. Hetta er eitt týdningarmikið ivamál við uppskotinum.

Annað ivamál, sum hevur verið frammi undir viðgerðini, er, hvar mørkini ganga, og hvussu skal skilmarkast, hvat manngott arbeiði er, sum kann koma undir uppskotnu treytirnar fyri skattafríari samsýning upp til 50 tús. kr. fyri sjálvboðið arbeiði. Uppaftur annað ivamál er, hvør ávirkanin verður, og hvussu skilmarkast skal í hesum máli, tá um átrúnaðarligt sjálvboðið arbeiði ræður.

Harumframt er neyðugt at greina, hvørja ávirkan tað hevur á arbeiðsmarknaðin, at fleiri løntakarar møguliga fara at arbeiða heldur minni í sínum vanliga lønta arbeiði fyri at flyta ein part av arbeiðsbrøkinum inn í hesa serstøku skattafríu skipanina. Neyðugt er at meta betur um, hvørja ávirkan tað kann hava á arbeiðsútboð og á skattaskipan landsins annars í einum samfelagi, har arbeiðsloysið er og leingi hevur verið metlágt.

Samanumtikið má sigast, at skal skipanin víðkast, so er neyðugt, at landsstýrið greinar og fyrireikar málið væl.

Beinir Johannesen og Magnus Rasmussen hava harumframt hesar viðmerkingar:

Mett verður, at hetta er eitt skilagott uppskot, sum undirritaðu í prinsippinum taka undir við. Men áðrenn endalig støða kann takast til slíka skipan, er avgerandi neyðugt at fáa greiðu á teimum ivamálum, sum nevnd verða í álitinum.

Undirritaðu halda, at landsstýriskvinnan eigur at koma í Løgtingið í heyst við einum lógaruppskoti við sama endamáli sum hetta, men har mørkini eru greið og ongi ivamál eru.

Við hesum viðmerkingum tekur meirilutin ikki undir við málinum og mælir Løgtinginum frá at samtykkja uppskotið.

Minnilutin (Steffan Klein Poulsen) hevur hesar viðmerkingar:

Skipanin við skattafríari samsýning til dómarar, linjuverjar, umframt til venjarar innan ítróttina, og leiðarar og hjálparar hjá ítróttafeløgum, hevur riggað sera væl. Tey, sum brúka skipanina, lata sera væl at, og hon er løtt at umsita. Hetta hevur verið ein góður viðspælari til at fáa ítróttina at blóma. Í 2022 fingu 1.139 persónar eina skattafría samsýning eftir hesari skipanini.

Føroyingar leggja tó ikki bara orku í ítróttina. Túsundavís av sjálvbodnum tímum vera lagdir í kirkjuligar, manngóðar og alment gagnligar felagsskapir, bæði ungum og gomlum at frama. Hesir felagsskapir koma ofta í ta støðu, at nógvar av teirra uppgávum fella á teir somu persónarnar, sum vit kunnu kalla lyklapersónar, samskiparar ella okkurt líknandi. Tá hava nevndirnar í hesum

felagsskapum oftani eitt ynski um at geva teimum eina samsýning. Størri parturin verður tó etin upp í skatti, og hesir felagsskapir hava eina sera avmarkaða fíggjarliga orku.

Undir hoyringunum hava allir hoyringarpartar umboðandi omanfyri nevndu felagsskapir, sum ikki koma undir ítrótt, víst á, at teir ynskja at koma undir somu skipan sum ítróttin. Samstundis hevur tað verið víst á, at galdandi skipan er kappingaravlagandi tá tað kemur til sjálvboðið arbeiði í Føroyum.

Tað einasta rætta er at viðurkenna alt sjálvboðið arbeiði í Føroyum á jøvnum føti. Tað er eitt sterkt og gott signal at senda út til føroyingar, uttanfyri ítróttina, at tey fáa somu viðurkenning og somu treytir, sum ítróttin fær.

Tí er tað ikki annað enn rímiligt at víðka galdandi skipan. Uppskotsstillararnir hava tí skotið upp at víðka ásetingina við hesari orðing: "*Sama er galdandi fyri samsýning til persón fyri hjálpararbeiði við kirkjuligum, manngóðum ella alment gagnligum endamáli.*".

Meirilutin ger nógv burturúr fíggjarligu avleiðingunum av hesum uppskotinum. Hoyringarpartarnir, umboðandi felagskapirnar, hava verið greiðir um, at teir ikki fara at samsýna øllum persónum, sum í dag gera eitt sjálvboðið arbeiði hjá teimum. Teir høvdu ei heldur havt fíggjarliga orku til tað, skuldu teir ynskt at gjørt tað. Allarhelst er fíggjarliga orkan nógv minni hjá hesum felagsskapum samanborið við ítróttafeløgini í Føroyum. Inntøkumissurin hjá landinum er tí øgiliga avmarkaður, og bulurin hjá hesum felagsskapum verður framvegis ólønt og sjálvboðið arbeiði.

Samanumtikið sleppur Løgtingið ikki uttanum at víðka hesa skipanina so ella so. Tað gongur ikki, at vit áhaldandi gera so stóran mun á ítrótt og øðrum frítíðarvirksemi í Føroyum. Alternativið er at avtaka galdandi skipan, um mann ikki vil víðka hana fyri at taka hendan stóra mismunin burtur.

Við hesum viðmerkingum tekur minnilutin undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

Fíggjarnevndin, 7. mai 2024

Eyðgunn Samuelsen forkvinna	Beinir Johannesen næstformaður	Bjarni Hammer
Eirikur í Jákupsstovu	Hanna Jensen	Magnus Rasmussen
	Steffan Klein Poulsen	